Søkt verður eftir

# starvsfólki

## til nýggju stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin

Nýggja stuðulsfólkaskipanin, ið hevur umsitingargrundarlag og ávísing í Grein 32 B í forsorgarlógini og er heimahoyrandi undir Trivnaðarmálaráðnum fer undir nýtt virksemi fyrst í hesum árinum. Talan er um eina skipan, ið er landsdekkandi og m.a. hevur sum endamál at veita hjálp, umsorgan ella stuðul til borgarar, ið búgva í egnum heimi, so hesir hava møguleika at velja og skapa sær eina tilveru eftir egnum fortreytum. Miðað verður ímóti, at borgarin kann varðveita ella bøta um sálarligt og likamligt virkni eins og tað sosiala.

Persónsbólkurin fevnir um fólk millum 18 og 66 ár, ið eru serliga illa fyri, tá tað snýr seg um likamlig ella sálarlig virknisevni ella serligar sosialar trupulleikar, sum gera, at tørvur er á fylgi og stuðli av sosialpedagogiskum slag. Harumframt eru røktaruppgávur, sum verða skipaðar í samstarvi við heimarøktina og aðra serstakar uppgávur. Umframt at verða ein skipan, ið veitur individuellan stuðul, verður eisini møguleiki fyri felagsvirksemi í tilhaldi. Í málbólkinum eru menningartarnað, sinnisveik, seinheilaskødd og rørslutarnað.

**Stuðulsfólkaskipanini tørvar fólk við ymiskum útbúgvingum sum t.d.:**
- pedagogar
- heilsurøktarar/sosial- og sunnheitsassistentar
- hjálparfólk

**Vit ynskja starvsfólk, ið m.a.:**
- hava royndir við omanfyri nevnda málbólki
- kunna átaka sær sjálvstøðugar arbeiðsuppgávur
- eru før fyri at tryggja góðsku í viðgerðararbeiðinum
- kunnu luttaka í tvørfakligum samstarvi
- eru human og tolin

**Vit kunna bjóða:**
- at tú verður við til at byggja upp eina nýggja stuðulsfólkaskipan
- fakliga menning, skeið og kollegiala supervisión
- felagshølir til bólkafundir o.a.
- trygg setanarviðurskiftir

**Stuðulsfólkaskipanin fer undir sítt virksemi soleiðis:**
**01.02.03.** Tær fyrstu fyriskipananar byrja
**01.03.03.** Suðurstreym
**01.04.03.** Vágarnar, Suðuroyggin, Norðoyggjar og Sandoyggin

og umsøkjararnir verða bidnir um at tilskilja í umsókníni hvar í landinum teir søkja starv

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um bæði heil- og parttíðarstørv og í nøkrum av størvunum má roknast við bæði dag, kvøld, serstakar frídagar og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri um størvini við at venda sær til til leiðaran fyri stuðulsfólkaskipanina á tlf. 304020.

**Umsóknarfreist**
Umsóknarfreistin til øll størvini er sett til mán. 20. jan. 2003 og umsóknir skulu sendast til:

### Stuðulsfólkaskipanin
Att. Leiðarin
Eirargarður 2, 2. hædd
Fo-100 Tórshavn

---

**Fiskimálaráðið**

# Skeiðleiðari til Trygdarmiðstøðina fyri sjófólk

Vegna økt virksemi, søkir Trygdarmiðstøðin í Klaksvík hervið eftir einum persóni, sum kann undirvísa í trygd á sjónum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- Undirvísa í trygd á sjónum, sum umfatar bæði ástøðiliga frálæru og venjingar í at nýta bjargingar- og eldsløkkiútgerð v.m.
- Vera við til at menna og gera frálærutilfar í samsvar við altjóða krøv og tørvin hjá vinnuni
- Vera við til vanligt viðlíkahaldsarbeiði á venjingarstøðini.

**Førleikakrøv:**
- Tað verður sett sum krav, at umsøkjari skal hava útbúgving sum navigatørur við royndum frá sjóvinnuni ella frá frálandavinnuni.
- Fyrimunur er, um viðkomandi hevur royndir í at undirvísa og fyriskipa trygdarvenjing umborð á skipi.

Viðkomandi, sum settur verður, skal kunna taka ymisk endurútbúgvingarskeið, sum eru viðkomandi fyri starvið.

**Setanartreytir:**
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Fiskimálaráðið, og stovnar/deildir undir tí, umfamt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovan. Tænastustaðurin er í løtuni Trygdarmiðstøðin í Klaksvík.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í virkisøkinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. februar 2003 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálaráðið**
Att.: Sjóvinnufyrisitingin,
Postsmoga 347 · 110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Trygdarmiðstøðina á tlf. 455882, og tosa við Marius Magnusson, leiðara, ella til Fiskimálaráðið á tlf. 353030 og tosa við Mary J. í Garði fíggjarfulltrúi.

---

www.sosialurin.fo

# Kvikkeyp

Søkt verður eftir fólki til skiftandi arbeiðstíðir, uml. 35 tímar um vikuna, at byrja skjótast gjørligt.

Ring og hoyr nærri á **tlf. 212490** ella **216990**.

**Kvikkeyp í Hornabø**

---

# Sunda kommuna

## Almennir bygdaráðsfundir 2003 eru kl. 20.00 hesar mánadagar

| | |
|---|---|
| 6. januar | 3. februar |
| 3. mars | 7. apríl |
| 5. mai | 2. juni |
| 7. juli | 1. september |
| 6. oktober | 3. november |
| 1. desember | |

**Fundarstaður: Kommunuskrivstovan**

**Kommunuskrivstovan**
Skrivstovutíð:
mánadag 9-12, 13.30-16.00
og 18.00-18.30
Týsdag-fríggjadag 9-12

---

# Útróðrarbátur við fiskiloyvi til sølu

Sera væl røkti útróðrarbáturin M/B Norðberg VN 409 verður hervið lýstur til sølu.

| | |
|---|---|
| Ár: | mars 1990 |
| Slag: | Hvalvík 900 |
| Stødd: | 29 føtur |
| Maskina: | 180 Hk Cummins |
| Tól: | VHF, GPS, radari, ekkolod og sjálvstýrara |
| Fiskiloyvi: | Bólkur 5A (Fult riknir útróðrarbátar). |

**Mobil 219545**

---

# Innbúgv

Vegna flyting selji eina hornasofu, sofaborð úr naturtræ og eitt reytt tunesiskt teppi fyri í alt kr. 3.000.

**Ring 573940 ella 373940**

---



# Pedagogur til tilhald

Í samband við at nýggja stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fer undir nýtt virksemi fyrst í árinum verður søkt eftir einum pedagogi at skipa fyri ymiskum virksemi í tilhaldinum í Tórshavn, sum er heimhoyrandi undir stuðulsfólkaskipanini.

Vit søkja eftir einum pedagogi við serligum áhuga fyri persónsbólkinum: vaksin fólk, ið eru illa fyri tá tað snýr seg um sálarlig og likamlig virknisevni og serligar sosialar trupulleikar. Uppgávan verður m.a. at skapa karmar fyri einum livandi og virknum tilhaldstaði.

**Vit ynskja eitt starvsfólk:**
- sum er útbúgvin pedagogur
- sum hevur royndir við omanfyrinevnda persónsbólki
- sum kann taka á seg sjálvstøðugar arbeiðsuppgávur
- sum kann tryggja góðsku í arbeiðinum
- sum kann arbeiða tvørfakligt og hevur góð samstarvsevnir
- sum er tolin og humanur

**Vit kunna bjóða:**
- at tú verður við til at byggja upp eitt nýtt tilhaldstað
- eitt avbjóðandi starv har tú fært ábyrgd
- møguleikar fyri skeiðvirksemi
- trygg setanarviðurskiftir

**Lønar og setanartreytir:**
Talan er um heiltíðarstarv undir Heimarøkt/Serforsorg og roknast má við kvøld og vikuskiftisarbeiði av og á. Løn sambært sáttmála millum Pedagogfelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreist:**
Umsóknarfreistin er 22. jan. 2003 og umsóknir saman við prógvum og viðmælum skulu sendast til:

### Stuðulsfólkaskipanin
Att. leiðarin
Eirargarður 2, 2. hædd
Fo-100 Tórshavn




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 3491
**Navn:** P/F Faroe Processing
**Hjánavn:** Fiskavirkið í Fuglafirði (P/F Faroe Processing)
**Adressa:** 530 Fuglafjørður
**Kommuna:** Fuglafjarðar Kommuna
**Stovningardato:** 02.01.2003
**Viðtøkudato:** 02.01.2003
**Kapitalur:** Kr. 6.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 6.000.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** P/F Faroe Seafood, Mykinesgøta 5, 100 Tórshavn (P/F 2452).
**Nevnd:** Hákun Steingrimsson, Mikkjalstrøð 5, 100 Tórshavn (formaður), Johannes Jensen, Millum Gilja 111, 188 Hoyvík, Thomas Arabo, 416 Signabøur og Árni Arge, Torsteinsgøta 2, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Rógvi Reinert, Inni á Fløtum, 180 Kaldbak
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av nevndarformanni saman við einum stjóra, av tveimum nevndarlimum saman ella av allari nevndini.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 02.01.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og reka fiskivirkir og aðra vinnu í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 03. januar 2003*

*Kristin Balle*

# Pedagogar ella hjálparfólk

## til Sambýlið í Smærugøtu 29

Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á Sambýlinum í Smærugøtu 29 í Havn er eitt pedagogstarv leyst at søkja til setan 1. februar 2003 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er tænastumannastarv, sett eftir sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Pedagogfelagið, lønt eftir lønarstiganum 24-31 eftir lønaravtaluni frá mars 2002. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi dag/kvøldvaktir umframt døgn- og vikuskiftisarbeiði.

Sambýlið er undir uppbyggjan og er ætlað 5 menningartarnaðum fólkum við sálarligum trupulleikum.

Dentur verður lagdur á, at tann sum settur verður, er likamliga og sálarliga væl fyri, er áhugaður at luttaka í øllum avbjóðingum og opin fyri nýhugsan. Eisini er neyðugt at kunna arbeiða sjálvstøðugt, at samstarva við onnur, umframt at vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í tí dagliga arbeiðinum.

Søkir tú nýggjar avbjóðingar og vil verða við til at menna hetta nýggja sambýlið saman við okkum, er tað nú tú hevur møguleikan.

Bert fólk, sum hevur lokið námsfrøðiligt prógv, verður sett í pedagogstarvið. Um ikki útbúgvi fólk verður sett í hetta starv, verður tað sett tíðaravmarkað við fólki við øðrum líknandi førleika.

Meiri fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 321068 og spyrja eftir Finn Larsen, fyristøðufólki. Umsóknarfreistin er 21. januar 2003og skulu umsóknirnar sendast til:

### Sambýlið í Smærugøtu
Att. Leiðarin
Smærugøta 29
FO-100 Tórshavn

Sosialurin -tað loysir seg

---

# Byrjað verður mánadagin 13. januar, og vit enda 12. apríl

Yndi bjóðar aftur nú øllum okkurt slag av kropsvenjing. Kvinnum sum monnum, ungum sum eldri, stórum sumsmáum, sterkum sum veikum.
Kom framvið og fá tær eitt prát.

## AEROBIC

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 17:00 – 18:00 Stór/ur *Elsa Maria/Florentze* | 19:00 – 20:00 Byrjarir *Elsa Maria/Tórhalla* | 18:30 – 19:45 Stepp/Styrki *Kirstin* | 16:30 – 17:30 Stór/ur *Elsa Maria/Florentze* |
| 18:30 - 19:30 Trimmari Øll *Oddvør/Tórhalla* | | 19:45 – 20:45 Aeroboxing *Kirstin* | 17:30 - 18:30 Aerobic Vand *Kirstin* |
| 19:30 - 20:30 Aeroboxing *Saranja* | | | 18:30 - 19:30 Trimmari Øll *Kirstin* |

## SPINNING

Stórt høli, betri og fjølbroyttari venjing

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 17:00 – 18:00 Spinn & Trimm *Óluva* | 17:45 – 18:45 Spinn & Trimm *Tórhalla* | 19:00 – 20:00 Spinn & Trimm eitt sindur vand *Eli* | 17:00 – 18:00 Spinn & Trimm *Óluva* |
| 19:00 – 20:00 Spinning eitt sindur vand *Evald* | | | |

**KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ:** **SKÚLANÆMINGAR**

| | | |
|---|---|---|
| 1 tíma um vikuna: | 490 kr. | 20% avsláttur |
| 2 tímar um vikuna: | 790 kr. | 20% avsláttur |
| 3 tímar um vikuna: | 990 kr. | |

## BALLETT

*Street-Funk-Jazz-Modern-Standard*

Byrjað verður aftur mánadagin 13. januar, og hildið verður á til einaferð í mai.

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag |
|---|---|---|---|---|
| 16:00 – 17:00 6-8 ár Modern dance *Vanya* | 16:00 – 17:00 8-9 ár Ballett *Barbara/Bennvør* | | 19:30 – 20:30 15 ár og eldri Modern jazz *Vanya* | 16:30 – 17:30 8-9-10 ár Modern dance *Vanya* |
| 20:30 – 22:30 Vaksin Standard Latindans *Vanya* | 17:00 – 18:00 6-7 ár Ballett *Barbara/Bennvør* | 16:30 – 17:30 10-11 ár Street-Funk-Jazz *Rannvá* | | 17:30 – 18:30 10-14 ár Modern dance *Vanya* |
| | 18:00 – 19:00 15 ár og eldri Funk-Jazz *Jóna* | 17:30 – 18:30 12-14 ár Street-Funk-Jazz *Rannvá* | | |
| | 20:00 – 22:00 Vaksin Standard Latindans *Vanya* | | | |

Vanya Peneva kemur úr Bulgaria.
Vanya hevur 5 ára bachelor útbúgving frá kunstakademinum fyri dans og musikk í Plovdiv

Kostnaður fram til mai:

| | 1 tíma um vikuna: | 2 tímar um vikuna: |
|---|---|---|
| 6-11 ár: | 450,- | 700,- |
| 12 ár og eldri: | 550,- | 900,- |

*Tilmelding á telefon 31 00 25 - 31 28 68 - 31 13 11ella møti bara til tíman í Yndi yviri við Strond 21*

**Yndi** *leigar tímar til feløg, fyritøkur og onnur. Ring og tosa við Elsu Mariu Eisini ber til at fáa persónlig venjing*



YNDI
*v/ Elsu Mariu Bærentsen*
*www.yndi.fo*

Yviri við Strond 21 - tlf 311 311
FO-100 Tórshavn - far. 213 213
e-mail: yndi@yndi.fo